FYLGISKJAL 5

LM-064/2020

Landsbanki Føroya

Tórshavn 26. nov 2020

Uppskot til broyting í lóg um húsalánsgrunn

Landsbankin hevur lisið uppskotið. Tað skal viðmerkjast, at Landsbankin bara ger viðmerkingar til broytingar, ið ávirka fíggjarmarknað og fíggingarviðurskifti. Landsbankin hevur fylgjandi viðmerkingar:

Til § 6 a.
Húsalánsgrunnurin veitir persónum ráðgeving um alternativar byggihættir og fíggingarhættir.

Í viðmerkingunum stendur, at: "Fólk tørva ráðgeving um, hvussu ein skipar seg í ein búfelagsskap, hvussu eitt lutaíbúðafelag verður stovnað, hvussu fígging fæst til vega o.s.fr."

Landsbankin skilur, at tað er tørvur á ráðgeving um alternativar byggihættir, sum ikki eru vanligir í Føroyum. Tað sum ikki verður greitt frá er, hvat hugsað verður um, at ráðgevast skal um: "hvussu fígging fæst til vega".

Landsbankin heldur at landsstýrið eigur at greiða nærri frá, hvørjar persónar og hvat slag av fíggjarligari ráðgeving landsstýrið hugsar um í hesum sambandi.

Landsbankin vil vísa á, at tað sum er, eru fleiri fyritøkur (peningastovnar) á privata marknaðinum, sum allar hava sum holla vitan at veita ráðgeving innan fígging. Eingin grundgeving verður givin í lógaruppskotinum um, hví Bústaðir skal brúka orku at uppbyggja nakað, sum møguliga longu er á marknaðinum ?

Til § 8 b, stk. 1
Her verður "250 mió. kr." broytt til "700 mió. kr."

Landsbankin hevur onga viðmerking til sjálva orðingina í lógini.

Landsbankin vil tó vísa til viðmerkingar, sum bankin gjørdi í sambandi við at lógin var broytt til at Bústaðir kundi taka 250 mió. kr. í láni til bústaðarbygging. Hesar viðmerkingar vóru sendar fíggjarmálaráðnum 22. januar 2019. Her vísur Landsbankin á, at tann bíligasti hátturin hjá Bústaðum at læna pening er at landskassin tekur lánið og síðani lænir peningin útaftur til Bústaðir. Bústaðir er eitt alment felag og tað er landskassin, sum í síðsta enda varar av felagnum. Bústaðir eigur tí at kunna brúka av kredittvirðinum hjá landskassanum. Landskassin hevur gott kreditvirðið og lænir tí bíliga á lánsbrævamarknaðinum.